# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn av og á, men onkur sólglotti. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, um kvøldið minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og møguliga okkurt ælið fyrrapartin, annars turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Sunnudagin lot av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mánadagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Ternan



*Edvard Joensen*

Tað koma mangir trúfastir summargestir hendanveg á hvørjum ári. Summir koma ár undan ári og vitja somu støðini. Ella leggja soleiðis til rættis, at tey fara meira víða um. Og nógv er at síggja.

Men fáir gestir leggja kortini so nógv fyri til tess at vinna oyggjarnar upp, sum ternan ger. Ferðast knøttin enda úr enda fyri at koma aftur á kendar leiðir. Hvat nevnist slíkt? Trúfesti? Fosturlandsalskur? Ella bara tað, sum á fremmandum máli verður nevnt instinkt?

Tá hon hevur flogið tann langa vegin, er gott at sleppa at hvíla seg eina løtu. Tí strævin man túrurin hava verið.

Men hon veit, at her er gott at koma til. Kennir seg heima, her hon er klakt og føðrað. Er floygd og hevur fingið sínar fyrstu tímar í navigatión, soleiðis at hon kann staðfesta breiddina og vita, nær hon er komin heimaftur. Tí ikki er altíð, at fjøllini sígjast so væl, at til ber at navigera eftir teimum. Hóast summar er.

Her setti hon seg so. Á básin við flótibrúnna í Sørvági og vónar ivleyst, at her í stilla hylinum man onkur ternumurtur fara at verða at veiða onkran dagin.

Men so er tað eisini ein treyt, at umhvørvið er reint. At ikki olja og onnur óhumska, sum kann skaða hana, flýtur á sjónum.

Tí hóast greitt er, at menniskjan eisini eigur at fáa pláss at vera til, eigur sama menniskja at ansa eftir, at tey, sum veikari eru, og tey eru mong, ikki noyðast at lúta fyri okkara vælferð.

Vit skulu vísa hetta vakra landið fyri teimum, sum koma at ferðast. Bæði við og uttan veingir.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 86 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | 11 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 23 |
| London | 14 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | -- |
| Oslo | 21 |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 29 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 31 |
| Malta | 33 |
| Tunis | -- |
| Beijing | 35 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 14 |
| Sydney | 28 |
| New York | 27 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 11 |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | 17 |
| Buenos Aires | |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 996 hPa. vestan fyri Skotland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Skotland stendur framvegis í stað, men grynnist spakuliga.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/07 kl. 06⁰⁰–21/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 9,0 mm – mált frá 20/07 kl. 06⁰⁰–21/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 51,2 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

14. juli: Mánin longst frá jørðini
17. juli: Tendring
25. juli: Fyrra kvarter
30. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. juli | 11.05 | 23.24 | 10.05 | 22.24 | 10.20 | 22.39 | 00.46 | 13.05 | 01.46 | 14.05 | 09.20 | 21.39 | 08.20 | 20.39 | 11.20 | 23.39 | 00.01 | 12.20 | 10.50 | 23.09 | — | 12.05 |
| 23. juli | 11.43 | — | 10.43 | 23.02 | 10.58 | 23.17 | 01.24 | 13.43 | 02.24 | 14.43 | 09.58 | 22.17 | 08.58 | 21.17 | 11.58 | — | 00.39 | 12.58 | 11.28 | 23.47 | 00.24 | 12.43 |
| 24. juli | 00.02 | 12.23 | 11.23 | 23.44 | 11.38 | 23.59 | 02.02 | 14.23 | 03.02 | 15.23 | 10.38 | 22.59 | 09.38 | 21.59 | 00.17 | 12.38 | 01.17 | 13.38 | — | 12.08 | 01.02 | 13.23 |
| 25. juli | 00.44 | 13.19 | — | 12.19 | — | 12.34 | 02.44 | 15.19 | 03.44 | 16.19 | 11.34 | — | 10.34 | 23.10 | 00.59 | 13.34 | 01.59 | 14.34 | 00.29 | 13.04 | 01.44 | 14.19 |
| 26. juli | 01.55 | 14.33 | 00.55 | 13.33 | 01.10 | 13.48 | 03.55 | 16.33 | 04.55 | 17.33 | 00.10 | 12.48 | 11.48 | — | 02.10 | 14.48 | 03.10 | 15.48 | 01.40 | 14.18 | 02.55 | 15.33 |

5 707265 100043 >